# Ov langt í einum

**Tað er at leypa ov langt, at gera allar Føroyar til eitt valdømi. Tað er meiri hóskandi at gera Føroyar til trý ella fýra valdømi**

TRAPPUTING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Stundin er kanska komin til at broyta valskipanina. Men at gera Føroyar til eitt valdømi, er at leypa ov langt.

Tað var eitt sjónarmið á Trapputinginum mánakvøldið.

Ført varð fram, at tað var kanska meiri hóskandi at gera Føroyar til eini trý, ella fýra valdømi.

- Tað hevði gjørt, at veljarin fekk eitt størri útboð at velja ímillum og fleiri flokkar høvdu fingið umboð í teimum ymsu valdømunum.

Eitt sjónarmið er eisini, at vit eiga at fara aftur til gomlu skipanina, har stillað varð upp í nummarrøð, har flokkarnir gera av, hvørji valevni, teir vilja hava á ting.

- Tað fer at gera tað áhugaverdari at vera virkin í politiskum arbeiði. Men so kundi flokkarnir eisini fingið betri javnvág ímillum kynini við at stilla eina kvinnu upp sum nummar eitt, ein mann sum nummar tvey, ella øvugt.

# Forðing fyri bygdafólk

**Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, sigur, at tað skínur ígjøgnum, at ein orsøk til at gera Føroyar til eitt valdømi, er fyri at forða fólkið úti um landið at velja síni egnu umboð á løgting og tað hóvaði honum als ikki**

TRAPPUTING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg haldi at tað er skeivt at gera lokalpolitikk til tað stóra trøllið í føroyskum politikki.

Tað førdi Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, fram á Trapputingi í Miðlahúsinum mánakvøldið.

Hann segði, at tað skínur ígjøgnum hjá teimum, sum vilja hava alt landið til eitt valdømi, tað er at summir av løgtingslimunum úti um landið verða afturvaldir.

- Tey, sum vilja hava Føroyar til eitt valdømi, vilja ikki bara hava rætt at velja síni egnu umboð á løgting. Tey vilja eisini forða fyri, at tey fólkið kring landið skulu sleppa at velja síni umboð á ting.

- Onkusvegna tykir mær sum um at vit eru endað í einum samanbresti ímillum ymsar mentanir og at tað eru summi, sum vilja forða ósiviliseraðum, bygdarfellum at velja Marjus Dam og Gerhard Lognberg á Løgting, sum bara tosa um Ginusøgur og tunlar.

Samfelagsfrøðingurin duldi ikki fyri, at hesin hugburðurin hóvaði honum als ikki, tí hetta er at gera seg inna grundleggjandi virði í fólkaræðinum, sama hvat vit annars halda um sjónarmiðini hjá ávísum politikarum.

Hann segði, at rakstrarrópini nú til frama fyri einum valdømi, minna um rakstrarrópini sum vóru, tá ið stýrisskipanin varð broytt.

- Tá varð ført fram, at fáa vit landsstýrisfólk, sum sjálvi hava ábyrgd fyri sínum málsøkjum, fara vit at fáa politikarar, sum vísa størri ábyrgd.

Men so spurdi hann um nakar kundi siga, at politikarar nú, vísa størri ábyrgd, enn teir gjørdu fyrr.

Samstundis hevði tað stóran týdning, at miðfyrisitingin varð styrkt.

- Men hetta hevur ført við sær, at stór ójavnvág er ímillum løggevandi valdið og útinnandi valdið, tí nú er tað at kalla bara fyrisitingin, sum ger lógaruppskot, meðan løggevandi valdið er viknað og tað sær út til, at hendan gongdin skal styrkjast.

Jógvan Mørkøre vildi ikki illgita politikarar.

- Men verður hetta uppskotið samtykt, er hann púra vósur í, at tað verður hetta, sum fer at standa í søgubókunum, at løgtingið broytti vallógina fyri at gagna politikarum, sum nú sita og fyri at tryggja summum av teimum afturval.

- Nettupp av teirri orsøk, eiga vit at sláa kalt vatn í blóðið. Vilja vit, at Føroyar skulu vera eitt valdømi, eiga vit ikki at gera tað óðum verkum, men vit eiga at lata málið taka tað tí, sum krevst og at gera tað við skili, útfrá teimum røttu fortreytunum.

Jógvan Mørkøre sigur, at trupulleikin er, at flokkarnir eru skeivt umboðaðir á tingi eftir atkvøðutalinum.

Men tað kann broytast í eini handavending við tveimum reglum í vallógini, so at vit fara yvir til ein útrokningarhátt, sum rættar hendan skeivleikan, legði hann afturat.

### Tað stóra trøllið

Ein høvuðsorsøk til, at summi vilja hava Føroyar til eitt valdømi, er at sleppa undan lokalpolitikki, ella ávísum seráhugamálum.

Men hví eru summi seráhugamál verri enn onnur, spurdi hann og hann skilir ikki, hví tað seráhugamálið, sum eitur lokalpolitikkur skal vera tað stóra trøllið í føroyskum politikki

Hann nevndi, at hann hevði verið í løgtinginum ein dagin og har sat ein røð monnum og ansaðu eftir, hvussu tingmenn atkvøddu í málinum um fiskidagar.

- Tað eru so mong seráhugamál á ymsum økjum, sum verða røkt, men ongin tosar um seráhugamál, tá ið talan er um fiskivinnumál ella skattamál og ongin tosar um, hvussu nógv, tað hevur kostað samfelagnum.

- Tað eru enntá nógvir flokkar, sum eru stovnaðir at røkja seráhugamál og eg havi ongantíð skilt, hví summi seráhugamál eru verri enn onnur, segði Jógvan Mørkøre.

# Missa áhugan fyri at velja

**Verða Føroyar eitt valdømi, ivast samfelagsfrøðingur ikki í, at valluttøkan fer at minka munandi**

TRAPPUTING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hesir báðir vóru eisini á trapputingi mánakvøldið. Soleiðis fangaði Óli P., teir báðar Jógvan við Keldu og Michael Matras*
*Tekning: Óli Petersen*

- Verða Føroyar eitt valdømi, fer valluttøkan at minka eini 10% - 15%.

Tað ivast Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, ikki eina løtu í.

Á Trapputinginum í Miðlahúsinum mánakvøldið, varð ført fram, at valluttøkan er ein hornasteinur í fólkaræðinum og tí varð spurt um nøkur meting var um, hvussu tað fer at ávirka valluttøkuna at Føroyar verða gjørdar til eitt valdømi.

Jógvan Mørkøre staðfesti, at valluttøkan í Føroyum er rættiliga høg. Men verða Føroyar eitt valdømi, ivast hann ikki í, at valluttøkan fer at minka munandi.

Sjálvur skeyt hann upp á, at valluttøkan fer at minka eini 10%-15%.

Hann heldur kanska ikki, at hetta fer at henda beinanvegin, men um eini trý val, fer valluttøkan at verða munandi minni.

Hann heldur, at orsøkin til, at vit hava so høga valluttøku í Føroyum, er júst tann, at áhugin fyri politikki er so stórur í hvørjum króki í landinum og tað kemst eina mest av, at vit hava valdømi, har tað verður mobiliserað og arbeitt við politikki kring alt landið.

Eitt uppskot varð at luta tinglimirnar kring landið eftir atkvøðutalinum, tí tað fer at trýsta fólk at vera við í valinum, tí sita tey heima, er vandin fyri, at valdømi missir ein tinglim til okkurt annað valdømi, har valluttøkan er størri.